# ni fyri góðum upsaprísi




*Lemmatrolarin, Sjagaklettur hjá hvalbingum, lá ein heilan dag og bíðaði eftir keypara við fiskinum í lastini. Teir høvdu fult skip, eini 120 tons av upsa. – Hetta verður støðan í vár, siga fiskaseljarar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Keldur í vinnuni siga, at fiskapakkin, sum landsstýrið legði upp til, og sum løgtingið seinni samtykti, ivaleyst hevur sínar dygdir einar 8-9 mánaðir av árinum, men pakkin er ein bági fyri vinnuna í vertíðini um várið.

Ein onnur avleiðing av, at so nógvur upsi er á marknaðinum, er eisini, at prísurin á øðrum fiskasløgum, eitt nú hýsu, fellir.

Líkt er til, at Fiskimálaráðið bara letur standa til við teirri ásannan, at tað er útboð og eftirspurningur, sum stýra prísskipanini og gongdini.

Í vinnuni halda tey, at hetta er ov snævurskygt, tí nógv meira kundi verið fingið burtur úr – eisini til samfelagið, um skipanin var meira liðilig.

Eitt er so tað, halda fólk í vinnuni, at allur fiskur, sum fer óvirkaður av landinum, skal bjóðast út í Føroyum. Eitt annað er, at tíðin, áðrenn hesin fiskur skal avskipast, bert er ein vika, og tað letur seg ikki gera at savna neyðugu nøgdirnar saman upp á so stutta tíð.

Hetta er tápuligt – og hetta er eisini ein beistagerð frá landsstýrisins síðu, halda fólk í vinnuni.

## Støðan í vár

Tey halda, at einasti møguleikin at byrgja uppfyri stórum prísfalli á upsa, nú so nógvur fiskur er at fáa, er, at tann smái upsin verður heilfrystur til útflutnings. Hetta gevur pening, bæði til skip og manningar, og hetta ger, at virkini fáa tann stóra upsan til virkingar.

Alt í alt hevði hetta verið ein nógv betri loysn fyri samfelagið enn hon, sum bíðar fyri framman: At vit fáa enn eitt stórt prísfall á tí ráværu, sum er grundarlagið undir einum so stórum partin av føroyskum vinnulívi, bæði á sjógvi og landi.

Vit kunnu vænta, at trupla støðan, sum longu hevur tikið seg upp, kemur at standa við og versna, so hvørt sum tað líður út á várið.



*Landsstýrið heldur eftir øllum at døma, at útboð og eftirspurningur skulu avgera, hvussu gongdin verður, men fólk í vinnuni halda hetta vera og snævurskygt og tápuligt*
*Mynd: Jens Kr. Vang.*